



» Eg kann ikki bara hava eitt barn, tí eg vil, uttan tað er tað, sum er best fyri barnið, er týdningarmiklast

Mynd: Álvur.

# okkara egnu«

– Tað veldst um, hvussu leingi hesin lítli verður búgvandi hjá okkum, sigur Fríðbjørn. Men tey síggja ikki aldurin sum nakran trupulleika heldur tvørturímóti.

– Tá tú er so gomul sum vit, so hevur tú uppalt tíni egnu børn og hevur lívssoyndir, sum eru góðar at brúka nú, sigur Krista.

Tann lítli drongurin, sum býr hjá teimum nú, er annaðhvørt vikuskiftið, og ein dag um vikuna hjá mammu síni.

Hann kallar bæði Kristu og Fríðbjørn og tey biologisku foreldrini fyri mammu og pápa.

– Vit hopa sjálvandi, at hann verður leingi hjá okkum eftirsum vit eru líka góð við hann sum okkara egnu børn, men soleiðis ber ikki til at hugsa, um tú skal arbeiða sum fosturforeldur. Eg kann ikki bara hava eitt barn, tí eg vil, uttan tað er tað, sum er best fyri barnið, er týdningarmiklast, sigur Krista.

– Eg síggi fram til tann dagin, har hon hevur fingið nóg góðar umstøður at taka sær av barninum sjálv, sigur Fríðbjørn og heldur fram, at hóast eitt barn fer aftur til biologisku familjuna at búgva, so merkir tað ikki, at vit missa kontaktina hana hava vit kortini bara á ein annan hátt.



*Hallbjørg Lamhauge er leiðari fyri Fosturforeldraskipanini.*

*Mynd. Jens Christian*

# »Hetta er ein trupulleiki sum vindur uppá seg«

**Umleið 50 børn í Føroyum búgva hjá fosturforeldrum. 30 av teimum búgva fast og restin er til umlætting viðhvørt. – Hetta er ein trupulleiki sum vindur upp á seg, sigur Hallbjørg Lamhauge, leiðari á Fosturforeldraskipanini.**

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Ì samband við at nýggja barnaverndarlógin kom í gildi 1 januar 2006 er ein Fosturforeldraskipan sett á stovn. Fyrr var tað barnaverndin í teimum ymiskum kommununum, sum tók sær av børnunum. Men nú er tað broytt, so at ábyrgdin liggur á Fosturforeldraskipanini.

Tí verður eisini lýst í fjølmiðlunum eftir fleiri fosturforeldrum, so at skipanin skal hava nøkur at velja ímillum, tá tørvur er á tí.

– Trupulleikin er størstur í Tórshavn, men eisini á bygd eru tað børn, sum hava tørv á fosturforeldrum, sigur Hallbjørg Lamhauge.

Oftast er tað rúsevni og manglandi foreldraførleiki, sum eru grundirnar til, at eitt barn ikki kann verða búgvandi heima.

Ongi hagtøl eru sum vísa á, hvussu gomul børnini eru, men Hallbjørg sigur, at oftast handlar tað um børn í skúlaaldri.

– Nógv halda, at tað handlar um pinkubørn, men tað er ógvuliga sjálsamt. Ofta er tað tá børnini gera vart við seg sjálvi, at tørvurin verður sjónligur, sigur hon.

Um børnini eru smærri, er tað ofta onkur rundan um tey, sum hevur gjørt vart við, at barnið ikki hevur tað gott og ikki mennist sum tað skal.

Tá barnið verður flutt frá heiminum, er tað oftast í samtykki við tey biologisku foreldrini, og tað er eisini tá, at tíðin hjá fosturforeldrunum verður mest gevandi. Ì summun førum ber ikki til at fáa samtykki, og tá verða børnini tikin frá foreldrunum við tvangi, men tað er ikki vanligt í Føroyum.

Hvør er munurin á børnum sum búgva á barnaheiminum og teimum, sum búgva hjá fosturforeldrum?

– Tey sum búgva á barnaheiminum eru ofta verri fyri og meiri viðgerðarkrevjandi, enn børn sum eru hjá fosturforeldrum, sigur Hallbjørg.

## Hørð krøv

Nógv krøv verða sett teimum, sum eru fosturforeldur. Tey skulu hava eina reina revsiváttan, góða heilsu, góðar bústaðarumstøður og helst hava royndir sum uppalarir millum annað. Eisini skal ein hugsa um, hvussu tað ferð at ávirka tí egnu familjuna at fáa eitt nýtt fólk inn í húsarhaldið.

*Hvat eru tað fyri fólk sum eru fosturforeldur?*

– Tað eru øll møgulig fólk, men tey hava til felags, at tey vilja gera mun.

Samsýningin tey fáa er 96 krónur um dagin, sum so kann faldast upp til sjey ferðrir, atl eftir hvussu uppgávan sær út.

– Summi kunnu hava eitt heiltíðarstarv og verða fosturforeldur, meðan onnur mugu hava farloyvi, tí barnið er so lítið og krevjandi.

## Duga at samstarva

At verða fosturforeldur er eisini at duga at samstarva við tey biologisku foreldrini. Børnini skulu varðveita sambandið við foreldrini, og hóast at umstøðurnar ikki eru broyttar í heiminum, so skulu børnini heim at vitja foreldrini.

– Tað kann verða eitt sindur torført at sleppa barninum til eitt heim, sum ikki er dugnagott, men tað mugu fosturforeldrini gera, sigur Hallbjørg Lamhauge.

Í uppgávuni hjá Fosturforeldraskipanini er eisini at stuðla teimum biologisku foreldrunum, so at barnið kann flyta heim aftur. Tað kann handla um at senda tey til avvenjingar, í familjuviðgerð og geva sálarligan stuðul.

– Tey foreldur sum missa børnini síggja tað ofta sum eina stóra sorg. Øll vilja vit jú verða góð foreldur, og tí er tað eitt niðurlag at ikki eydnast við tí, sigur Hallbjørg.

Fyri at barnið skal flyta heimaftur, skulu umstøðurnar heima verða broyttar til tað betra. Um ikki verður barnið búgvandi hjá fosturforeldrunum til tað er 18 ár ella í summun førum til tað er 21. Tað hendur eisini, at fosturfamiljan ættleiðir børnini, men tað hoyrir ikki til tað vanliga.